


www.oljan.fo

**Jan Müller** 05 - 04 - 2013

# Mærsk stóra oljuíløgu í Norðsjónum

A.P. Møller - Mærsk og hinir samstarvsfelagarnir í Dansk Undergrunds Consortinum (DUC) eru nú klárir við einari íløgu í Norðsjónum. Íløgan er tann størsta í fleiri ár. DUC hevur gjørt av at brúka 800 milliónir dollarar ella umleið 4,6 milliardir krónur til eitt nýggjan pall í Norðsjónum, og frá honum vænta feløgini at fáa nógva olju og nógv gass tey næstu nógvu árini. Tað skrivar Mærsk Olie og Gas í einum tíðindaskrivi. Við verkærlanini verður Tyra-leiðin víðkað, og DUC roknar við at fáa 50 milliónir tunnur av olju og gassi upp haðani ta næsta 30 ára skeiðið. Tyra-leiðin er ein av teimum størstu gassleiðunum í danska partinum av Norðsjónum. Nýggj tøkni neyðug Tær 4,4 milliardir krónurnar, sum verkætlanin kostar, skulu fíggja ein ómannaðan pall, rørleiðingar og arbeiðið at bora millum átta og tólv horisontalar brunnar, sum verða seks kilometrar langir hvør. Mark Wallace hjá Mærsk Olie og Gas sigur, at tað er framvegis nógv til av olju og gassi í Norðsjónum, men at tað er truplari at fáa fatur á tí, sum er eftir, og tí er neyðugt við nýggjari tøkni, fyri at tað framvegis skal loysa seg at gera íløgur har. Mærsk Olie og Gas hevur skrivað undir sáttmála við Bladt Industries um at standa fyri arbeiðinum at byggja tann nýggja pallin, og gongst sum ætlað verður tann fyrsta oljan pumpað upp tíðliga í 2015. Feløgini í Dansk Undergrunds Consortium eru A.P. Møller - Mærsk, Shell, Nordsjóvargrunnurin og Chevron. A.P. Møller - Mærsk er operatørur.